**Reglugerð**
fyri fjølmiðlar í Løgtinginum

Tað er ein týðandi lutur í demokratinum, at fjølmiðlarnir hava møguleika at fylgja við tingarbeiðinum í Løgtinginum. Samstundis er neyðugt, at fjølmiðlarnir virða reglurnar um skilhald v.m., sum eru galdandi í Løgtinginum, eins og hølisumstøðurnar seta nøkur natúrlig mørk fyri, hvat er gjørligt. Fyri at fáa hesi viðurskifti at ganga hond í hond í mest møguligan mun, hevur Formansskapurin ásett hesar reglur fyri virksemið hjá fjølmiðlunum í Løgtinginum:

*Atgongd sum heild*

**§ 1.** Fjølmiðlarnir hava atgongd til Løgtingið, tá ting- og nevndarfundir eru, og annars eftir avtalu við løgtingsformannin ella umsitingina. Fjølmiðlafólk eiga at bera sjónligt frámerki, sum fæst í Løgtinginum, og sum vísir, at tey umboða fjølmiðlarnar, tá tey eru her.
*Stk. 2.* Fjølmiðlarnir eiga rætt til Fjølmiðlarúmið, og kunnu taka myndir og gera samrøður í Fjølmiðlarúminum, í forhøllini og á økinum uttanfyri Løgtingið. Samrøður við tingmenn, løgmann og landsstýrismenn kunnu eisini gerast í hølunum uppi á loftinum í tinghúsunum.
*Stk. 3.* Fjølmiðlarnir kunnu eisini gera samrøður við tingmenn, løgmann og landsstýrismenn í hølunum á 2. hædd eftir avtalu við løgtingsformannin ella umsitingina.

*2. hædd*

**§ 2.** Fjølmiðlarnir hava atgongd til gongina á 2. hædd, tá nevndarfundir eru, men hava ikki atgongd til einstøku fundarhølini, uttan at hetta er eftir avtalu við umsitingina ella við nevndarformann, tá nevndarfundur er.
*Stk. 2.* Fjølmiðlarnir hava ikki rætt til at gera ljóð- og myndaupptøkur á 2. hædd, uttan at hetta er avtalað við partarnar frammanundan. Hetta skal ikki nerva annað virksemið í hølunum.

*Tingsalurin*

**§ 3.** Tá tingfundur er, hava myndafólk hjá føroysku fjølmiðlunum atgongd til at taka myndir í tingsalinum. Onnur fjølmiðlafólk hava ikki loyvi at fara fram í tingsalin, men kunnu vera á áhoyraraplássunum ella í klivunum uppi á loftinum.
*Stk. 2.* Myndir kunnu takast við myndatóli á stativi úr báðum hornunum fremst í salinum og úr horninum aftast í salinum í niðara borð, og annars við handbornum myndatóli fram við báðum síðunum í salinum, sbr. tó § 4, stk. 2.
*Stk. 3.* Myndaútgerðin má ikki órógva tingarbeiðið og møguleikan hjá tingmonnum og øðrum at røkja sítt virksemið í tingsalinum. Um neyðugt kann Løgtingið at avmarka talið av myndafólkum, sum kunnu vera í salinum samstundis.

*Skilhald*

**§ 4.** Fjølmiðlarnir eiga at hugsa um, at Løgtingið eisini er arbeiðspláss hjá øðrum, og tí vísa fyrilit í so máta.
*Stk. 2.* Myndatøka í Løgtinginum skal ikki endurgeva innihald í ikki almennum skjølum ella á telduskíggjum, og skulu slíkar myndir kámast, áðrenn tær verða nýttar.

*Stk. 3.* Útgerð o.l. skal ikki vera til ampa ella tarna gongdini millum ymsu hølini í tinginum. Fjølmiðlarnir skulu í øllum lutum taka upp eftir sær sjálvum, so alt er ruddiligt, og skulu rætta seg eftir boðum frá umsitingini hesum viðvíkjandi.
*Stk. 4.* Ivamál um hesar reglur, eiga at verða tikin upp við umsiting tingsins, sum tekur avgerð um ivamálini.
*Stk. 5.* Greið ella endurtikin brot á hesar reglur kunnu hava við sær, at einstaki fjølmiðilin heilt ella lutvíst verður vístur burtur úr tinginum í ávíst tíðarskeið.

Samtykt á fundi í Formansskapinum, 3. august 2020

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri